# Sic við nýggjari manning og nýggjari heimasíðu

**Tungmálmsbólkurin yvir allar føroyskar tungmálmsbólkar, Sic, hevur fingið heimasíðu. Á bústaðnum www.entersic.com liggur nýggja heimið á netinum hjá tungasta málmsbólkinum í Føroyum**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*

Sic vóru eitt av teimum nógvu jaligu upplivingunum í Prix Føroyum í ár. Bólkurin fekk við sínum orkumikla tónleiki allan salin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði at kóka, og sjálvt um teir ikki komu víðari í einum hørðum umfari, høvdu teir sligið navnið Sic fæst.

Bólkurin hevur síðan prixið skift út í manningini. Teir skriva á heimasíðuni, at síðan teir byrjaðu í 2002 til februar í ár, hendi líti og einki annað enn nakrar konsertir. Eingin dokumentatión liggur eftir frá hesum árunum. Teir siga víðari, at tað var ikki fyrr enn í februar, at Sic fekk manningina, sum bólkurin hevur uppiborðið.

Sangarin Mikkjal G. Hansen og gittarleikarin Eddie Jakobsen eru enn í bólkinum. Farnir eru bassleikarin Meinhard og trummuleikarin Kári, og ístaðin eru tríggir mans komnir, Frans Galán á gittar og sang, Magnus Hansen á trummum og sang og Gudmar Hansen á bass.

Hetta eru spennandi avloysarar, Frans er kendur úr nógvum av bólkunum á Margarinfabrikki í Havn eitt nú 48 pages og Fólkayvirlitið. Magnus spælir trummir í Makrel, og hevur fyrr sungið í Diatribes. Gudmar Hansen hevur sambært entersic.com eisini spælt í ymiskum bólkum, tó ikki nøkrum, sum hava veruliga sligið í gjøgnum.

Heimasíðan er annars pen og fitt, men har er ikki nógv tilfar enn, okkurt lítið tónleikabrot er, og nakrar heilt fáar myndir, men mest stuttligi parturin er vangamyndirnar av limunum.

Nýtt yrkingasavn:

# Gud og erotikkur

**Alexander Kristiansen hevur givið út nýggja yrkingarsavnið *Báðumegin blátt*, har Gud og erotikkur eru sterku drívmegirnar**

YRKINGAR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



Úr Fuglafirði er í mong ár komin ein streymur av dygdargóðum og fjølbroyttum skaldskapi. Høvundurin er Alexandur Kristiansen, sum ferðast heimkunnigur ímillum øll hugsandi sløg av lyrikki. Hann týðir klassiskar høvundar, ger barnasangir og evnar skaldskap til, sum er ímillum tað dyggasta í okkara landi.

*Báðumegin blátt* leggur fyri við "Kredo", har tað verður sagt, at Guð er í øllum. Hann er í barndómsins brekkum, í taranum, í flykrunum, í tambaðum seglum, men niðurstøðan er kortini, at hann er ein spegilsmynd av okkum sjálvum. Síðani kemur ein røð av kærleiksyrkingum við tølandi erotiskum lýsingum. Føðilandsalskurin vísir seg eisini, men hann finst ikki bara í náttúruni, men í okkara lívi og er avgjørt ikki av chauvinistiskum slagi. Hugleiðingar verða gjørdar um himmal og helviti, og at tað er ilt at velja ímillum, so man jørðin ikki vera tað frægasta? Her rør høvundurin fram undir sjónarmið, sum minna um William Heinesen, ið eisini vildi vera við, at tað mest undurfulla finst her á fold.

Í savninum er eisini ein vøkur kantata til heimbygdina rammað inn av sonettum til deyðar høvundar og opinskáraðar erotiskar lýsingar, eisini kallaðar saftigar sonettir.

"Báðumegin blátt. Savn við yrkingum" er eingin svíkur í føroyskum bókmentum.

Alexandur Kristiansen: *Báðumegin blátt*. Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út. 119 bls. kr. 140.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 24, 2005
www.kaupthing.fo

# Dollarin styrknar

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku komu fá týdningarmikil lyklatøl. Tað førdi við sær, at broytingarnar á marknaðunum ikki vóru so stórar. Amerikanski tjóðbankastjórin helt røðu, har hann legði áherðslu á, at amerikansi búskapurin ikki er í vandi fyri at steðga upp, og at tjóðbankin fer at halda áfram við at hækka stuttu rentuna. Undirskotið á amerikanska handilsjavnanum var eitt vet minni enn væntað. Hetta eru øll viðurskiftir, ið eru við til at styrkja dollaran. Tað sær enn ljóst út hjá dollaranum í mun til evruna, kursurin er nú undir 1,21 fyri hvørja evru. Um marknaðirnir aftur seta sjóneykuna á gjaldsjavnahallið, kann vend tó koma í.

## Lánsbrævarenturnar lækka enn

Lánsbrævarenturnar eru lækkaðar nærum út í eitt seinastu 3 mánaðirnar. Danska 10-ára rentan er nú 3,10% og íleggjarar tykjast enn bjartskygdir um lánsbrøvini, so rentan kann lækka enn meir.

## Partabrøv hækka

Lækkandi oljuprísurin og bjørtu búskaparútlitini í USA stuðlaðu undir framhaldandi virðisøkingina á partabrævamarknaðinum 6. viku á rað. Á norrønu marknaðunum stóð serliga Statoil seg væl (+5,5%). Eisini A.P. Møller-Mærsk hækkaði heili 3,6% í farnu viku, tá keypsboð teirra uppá 17 milliardir DKK fyri kappingarneytan P&O Nedlloyd var kunngjørt. Síðani reiðarin Fredriksen í farnu viku keypti 48% av partabrøvunum í Pan Fish frá Nordea, er virðið á partabrøvunum næstan tífaldað. Eftir stóru hækkanina á partabrævamarknaðinum er sannlíkindi økt fyri, at íleggjarar kunnu fara at staðfesta vinning hesa vikuna og kann tað fáa partabrøv at lækka.

## Hesa vikuna

Hendan vikan verður týðandi fyri dollarakursin. Prísvøkstur og ídnaðarframleiðsla í bæði USA og Evropa verða kunngjørd, umframt smásøla og gjaldsjavnahallið í USA. Um prísvøksturin í USA verður hægri enn væntað, styrkir tað dollaran. Um gjaldsjavnahallið hinvegin er størri enn væntað, viknar dollarin. Marknaðirnir eru tó sum heild bjartskygdir um dollaran, og tað kann styrkja hann enn meir. Lyklatølini fara væntandi eisini at ávirka partabrøv í vikuni.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 614,29 | 1,0% | ↑ |
| JPY | 5,65 | 0,1% | ↑ |
| GBP | 1.113,22 | 0,8% | ↑ |
| NOK | 94,90 | 0,8% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,30 | 0,2% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 176,76 | 0,5% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 92,54 | 0,9% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 64,74 | 0,1% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*